# t undan 95% av hjáveiðini



*Endamálið við skiljirist í svartkjaftatroli er at byrgja uppfyri, at óynskt hjáveiða, sum stundum er ein trupulleiki í føroyskum og íslendskum sjógvi, ikki endar aftur í trolposanum*
Mynd: Rógvi Mouritsen

## Fakta um verkætlanina

Verkætlanin um rist í svartkjaftatroli er gjørd í samstarvi millum trolvirkið Vónina, svartkjaftaskipini og Fiskirannsóknarstovuna, sum saman við játtanini til "varðveiting av fjølbroyttum flota" eisini hava fíggjað ætlanina.

Tey, ið hava staðið fyri royndunum, eru Áslakkur Hansen (Vónin) og Kristian Zachariassen (Fiskirannsóknarstovan).

Kristian Zachariassen hevur skrivað frágreiðingina um royndirnar sum gjørdar eru umborð á Nærabergi og Christiani í Grótinum.

Uttan gott samstarv millum P/F Vónina, svartkjaftaskipini og Fiskimálaráðið var henda verkætlan ikki vorðin til veruleika.

á hesum skipum sjálvar gjørt.

- Tann fyrsta ristin, sum vit royndu, var gjørd úr stáli, har stykkini vórðu heft saman við ketulásum. Henda ristin vísti seg at sía best sjógv av teimum trimum ristunum, men trupulleikin við stálristini er, at hon boygnar sera lætt og rættar seg ikki útaftur.

Kristian sigur, at onnur ristin, sum teir royndu, var gjørd úr plasti – úr sama tilfari, sum rækjuristirnar verða gjørdar úr. Hetta er samstundis sama ristin, sum roynd er í Íslandi.

- Fyrimunurin við hesum tilfari er, at tað er lætt, og at tað heldur boygnar enn brotnar. Vansin er, at nógv tilfar er í ristini í mun til flatuna, og soleiðis tekur hon nógvan sjógv á seg. Streymurin av sjógvi gjøgnum ristina verður tískil ikki so góður.

Triðja ristin, sum royndir eru gjørdar við, er umrødda "flexigrid" ristin, ið er gjørd úr plastrørum, sum eru drigin upp á ein enda og fest saman sum eitt net. Henda ristin er gjørd í Hetlandi.

- "Flexigrid" ristir hava verið brúktar í alivinnuni í nøkur ár til støddarskiljing av laksi í ringunum. Ristin vísir seg at rigga væl; tá ið trolið fer út, liggur hon saman, men so hvørt, sum trolið letur seg upp, fer hon sundur, og tá ið trolið er komið at standa, er ristin uppspílað við einum lítlum bugi í miðjuni. Fiskurin fer væl ígjøgnum, og ristin er løtt at arbeiða við á dekkinum, sigur Kristian Zachariassen.




*Myndin vísir, hvar uppsamlingsposin er festur. Undir vanligum fiskiskapi er sjálvsagt eingin uppsamlingsposi í trolinum*

### Passivur fiskur

Undirsjóvarupptøkurnar vísa annars, at svartkjaftur er ein sera passivur fiskur, tá ið hann er komin aftur hagar, har ristin stendur. Hann fer meira ella minni við streyminum og svimur næstan ikki sjálvur.

Fiskirannsóknarstovan eigur undirsjóvarupptøkur sum lýsa, hvussu ymisku ristirnar virka undir fiskiskapi eftir svartkjafti.